gult2 cyan2 magenta2 svart2

Spælimanstónleikur í Pæsastovu

Føroya Fólka-tónleikarafelag
Tíðindaskriv

Nú sunnudagin 8. juli kl. 17.00 verður ein tónleikaframførsla í Pætursarstovu í Havn. Tað eru Angelika Nielsen og Kári Sverrisson, ið spæla fiól, og Justin Philbrow, ið spælir kassagittar, ið framføra dansiløg úr nótabókini hjá Jens Christiani Svabo (1746-1824). Hondskrivaða nótabókin, sum í dag er í varðveitslu á Landsbókasavninum, varð funnin á loftinum í Pætursarstovu í 1928. Svabo búði í hesum húsunum frá 1800 til 1824, tá ið hann doyði. Umframt løg úr bókini hjá Svabo spæla Angelika, Kári og Justin løg hjá Ívari Bærentsen.

NØVN Í VIKUNI

Karl Johan Mikkelsen 80 ár

Í dag verður Karl Johan Mikkelsen í Tórshavn 80 ár.

Karl Johan, sum er sonur Mikkjal í Grønlandi, er havnarmaður burturav. Føddur og uppvaksin í Havn og hevur búð í Havn alla sína tíð. Tey eru fimm systkin, sum øll eru á lívi. Tað elsta er 84 ár.

Karl Johan byrjaði í 1951 at arbeiða á heilsøluni hjá Poul Hansen, og gjørdist tað lívvstarv hansara. Hann varð hjá Poul Hansen í meira enn 40 ár.

Karl Johan giftist Katrinu, sum eisini er úr Havn, tann 2. oktober 1951. So um heilsan verður, fara tey bæði at hava gullbrúdleyp í heyst. Tey fingu fimm børn, fýra synir og eina dóttur.

Karl Johan hevur stóran áhuga fyri ítrótti. Fótbóltsáhugaður er hann, og eingin ivi hevur nakrantíð verið í sálini um, at tað er HB, sum er rætta felagið.

Men seinnu árini er onnur ítróttargrein komin uppí, sum hann rættiliga er bitin av. Hann er nevniliga abbi tann heimskenda Regin Vágadal. Og har er einki at gera. Hann er helst trúgvasti viðhaldmaðurin hjá Regini yvirhøvur. Gongur við lív og sál upp í tað, abbasonurin tekst við. Og hevði hann orkað, siga tey, sum næst eru, var eingin ivi um, at hann var til hvørja einastu kapping hjá Regini, líka mikið hvar í heiminum tað var.

Í seinastuni hevur heilsan spælt honum okkurt puss. Hann misti annað beini orsakað av sjúku fyrr í ár. Tað var sjálvandi ein dyggur smeitur, men nú, hann hevur fingið protesu, tykist einki ófort aftur.

Karl Johan er sera íðin síla- og laksafiskari, og ein beinprotesa fer ikki at steðga honum at røkja hetta frítíðarítrivið. Hann hevur longu í summar verið onkran túr við tráðuni. Og tað ber væl til. Han hevur stól at sita á, og so er bara at halda seg til.

Her er nýggi Smyril

Soleiðis sær tað nýggja Suðuroyarskipið út. Hetta er eitt framtíðarskip og verður størsta einstaka byggimálið hjá tí almenna nakrantíð.Strandferðslustjórin heldur, at tað hevur skund at fáa tað bygt, tí sum er, eru dagligir trupulleikar av, at Smyril, sum nú er, er ov lítil

Fyri fyrstu ferð kunnu vit nú vísa almenninginum eina mynd av nýggja Smyrli, sum Landsstýrið hevur samtykt at byggja til suðuroyarsiglingina

SUÐUROYARSIGLINGIN
Áki Bertholdsen

Her er hann so. Tann nýggi Smyril, sum Landsstýrið hevur samtykt at byggja til suðuroyarsiglingina. Fyri fyrstu ferð kunnu vit nú vísa almenninginum eina mynd av, hvussu nýggi Smyril fer at síggja út. Hetta er ein nýggj teldumynd, ið vit hava fingið fatur á. Á sama hátt sum ein fotmynd, vísir hon, hvussu skipið sær út.

Nýggi Smyril verður 135 metrar langur og 22,7 metrar breiður og hann stingur 5,6 metrar. Skipið hevur 20.900 hestakreftir, sum geva honum eina vanliga siglingarferð upp á 21 míl. Um summarið tekur hann 975 ferðafólk og um veturin 800. Og hann hevur sitipláss til øll. Tað hevur Smyril sum er, verri enn so.

Smyril, sum er, er 92 metrar langur, 16,5 metrar breiður og siglur 16,5 míl og hevur 10.080 hestar.

Nýggi Smyril tekur einar 30 trailarar, ella 200 persónbilar, tað er tvær ferðir so nógv sum Smyril, ið nú er. Ikki minst á biladekkinum verður nýggja skipið ein sonn kollvelting afturímóti Smyrli, sum er. Tað verður gongubreyt í biladekkinum, so at tað verður óneyðugt hjá fólki at ganga og trokast ímillum bilarnar.

Hann verður bygdur sum eitt havgangandi skip. Tað merkir m.a. at hann hevur spíska gron og sker seg ígjøgnum alduna ístaðin fyri at trampa, sum hesin Smyrilin ger. Hann er eisini útgjørdur við stabilisatorum.

– Sostatt verður hetta eitt munandi róligari skip at sigla við, enn Smyril, sum nú er, siga stjórin og tekniski leiðarin á Strandferðsluni.

– Nýggi Smyril hongur eisini við tungolju og tí er hann enntá bíligari í rakstri enn Smyril, sum nú er.

Nýggi Smyril hevur 100 koyggjur. Hann hevur eisini tyrlupall, tí tað skulu øll so stór skip nú hava. Men tað gevur honum eisini ein einastandandi møguleika at vera til hjálpar, um ein vanlukka, t.d. skuldi hent á einum boripalli. Annars hevur hann sjúkrarúm og lyftir, so at tað ikki longur verður neyðugt hjá sjúklingum at liggja í sjúkrabilinum á dekkinum á allari ferðini. Harumframt hevur hann fundarhøli og aðrar nýmótans hentleikar.

Annars er ætlanin er at leggja projektið fram fyri almenninginum á fundi í Suðuroynni, sum væntandi verður í august mánaða.

Stórur flutningur til Vágs

SERFLUTNINGUR

Hósdagin fluttu Farmaleiðir eitt stórt flutningskar frá Nomatech í Havn suður til Vágs.

Tað er nýggja laksavirkið hjá Hera Hjelm í Vági, sum eigur karið, sum skal pumpa fiskin úr ringunum og køla fiskin, áðrenn hann kemur á flekiborðið inni á virkinum.

Farmaleiðir á veg frá NomaTech í Havn. Nyggja flutningskarið skal brúkast á nýggja virkinum hjá Hera Hjelm í Vági

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Nýtt virki í Vági til 100 arbeiðspláss

Um tríggjar vikur verður farið til arbeiðis á einum nýggjum laksavirki í Vági, sum Heri Hjelm ger í gamla flakavirkinum, Polarfrost

ØKISMENNING
Áki Bertholdsen

Um tríggjar vikur sleppa eini 100 fólk afturat til arbeiðis í Vági.

Samstundis er tað greitt, at vágbingar loksins fáa gamla ynski sítt uppfylt um, at tað stóra flakavirkið í býnum, Polarfrost, skuldi lata upp aftur.

Tað her Heri Hjelm, sum nú hevur leigað Polarfrost frá Føroya Fiskavirking.

Heri Hjelm hevur tikið samstarv upp um alingina við norsku stórfyritøkuna Pan Fish, og tað eru eisini tey bæði, sum standa aftan fyri nýggja virki í Vági.

– Við Pan Fish hava vit fingið ein sera sterkan samstarvsfelaga, sum bæði hjálpir okkum fíggjarliga og við søluarbeiðnum.

Beint ímóti nógvum øðrum, er Heri Hjelm ikki bangin fyri útlendskum kapitali.

– Um tað eru føroyingar ella norðmenn, sum skumpa undir vinnulívið í Føroyum, dugi eg ikki at síggja nakran mun á.

– Í fyrstu syftu hava vit leigað virki, men vit hava ikki slept ætlanunum um at keypa tað. Vit samráðast við Fiskavirking um at keypa, men enn eru vit ikki komin ásamt um treytirnar. So vil tíðin vísa, hvat kemur burturúr sigur Heri Hjelm.

Men tað verður ikki sum flakvirki, at Polarfrost nú letur uppaftur. Tað er nevniliga eitt laksavirki, sum Pan Fish og Heri Hjelm nú gera á Polarfrost.

Hesa seinastu tíðina hava fólk havt úr at gera við at taka alt innan úr polarfrost og at innrætta tað av nýggjum og at seta maskinur og tól upp.

Annars sigur Heri Hjelm, at virkið er vælegnað til endamálið, tí tað er bara onkur hendinga skilaveggur, sum er fluttur.

Framkomið laksavirki

Laksavirkið, sum Heri Hjelm nú letur upp í Vági er av tí framkomna slagnum.

Á virkinum er ætlanin at slakta laks, at skera hann til flak, at pakka hann í smápakkar og at frysta hann.

Hann sigur, at ætlanin at byrja á nýggja virkinum síðst í hesum mánaðinum, tá ið farið verður at slátra laks har.

Í løtuni arbeiða 120 fólk í fyritøkuni hjá Hera Hjelm og Pan Fish.

Tá ið nýggja virkið letur upp, væntar hann, at brúk verður fyri 100 fólkum afturat.

Fá pláss hava verið so hart rakt av kreppuni, sum Suðuroyar Syðra helvt, men seinastu árini hevur tað gingið støðugt framá.

Og nú er viðhvørt so nógv arbeiðið, at tað hevur verið ført fram, at tað stendur á at fáa arbeiðsfólk í Vági, tá ið tað fellur so, at nógvir bátar eru inni í senn og frystigoymslan eisini tekur ímóti ella avskipar og alt kemur ísenn.

Men Heri Hjelm væntar ikki, at tað verður trupult at fáa arbeiðsmegi til nýggja virkið.

– Um vit fáa fólk ella ikki, veldst í stóran mun um, hvussu støðugt arbeiðið verður. Støðugari tøkan og framleiðslan verður, læ ttari verður at fáa arbeiðsfólk, tí tað, sum sum fólk mangan leiðist við, er, tá ið arbeiðið er so óstøðugt, at tað bara eru einstakir dagar upp ímillum.

Heri Hjelm sigur, at teir vænta rættiliga støðugt arbeiði á nýggja virkinum.

– Vit hava nógvan fisk at taka og ætlanin er at virka hann so nógv, vit kunnu. Hetta er tí eitt virksemi, sum krevur nógv arbeiði og orkan verður til at virka nógvan laks.

Heri Hjelm sigur, at nýggja laksavirki er ein íløga upp á ímillum 50 og 60 milliónir. Á virkinum er orka til at arbeiða 24 tons á hvørjari vakt.

Hann sigur, at føroyingar hava verið forðaðir í at virka laks, tí er útflutningurin til ES farin upp um eitt vist, skal tollur gjaldast. Tann forðingin er síðani burtur so nú kunnu vit virka sum vit vilja.

Seinastu tíðina er alt skrætt innanúr stóra flaakvirkinum, Polarfrost í Vági. Men nú verður tað fylt aftur við nýggju maskinum og um tríggjar vikur verður nýtt laksavirki fyri 50-60 milliónir upp í bygninginum. Arbeiði verður til eini 100 fólk og talan verður um rættiliga støðugt arbeiði

Tað hevur pínt vágbingar í fleiri ár, at tað stóra flakavirkið í bygdini hevur staðið óbrúkt. Men nú letur tað uppaftur. Heri Hjelm og Pan Fish hava leigað tað og gera tað nú til eitt framkomið laksavirki